Álit

í

løgtingsmáli nr. 99/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin) (Heimild at skjóta grágás og brandgás)

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur lagt málið fram 28. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð tann 7. mai 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 12. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Bóndafelagið, Føroya Fuglafrøðifelag og landsstýrismannin í vinnumálum, Jacob Vestergaard.

Grágás og brandgás eru til ampa hjá føroyska landbúnaðinum. Ítøkiliga lógaruppskotið er ikki ætlað til skipaða veiðu av hesum fuglasløgum, men til at geva bóndunum eitt amboð at verja bøin.

Búnaðarstovan hevur gjørt kanningar, sum vísa, at gásin ger stóran skaða, sleppur hon ótarnað framat veltum lendi.

Landbúnaðurin hevur undanfarin ár havt loyvi at skjóta grágás, og hevur hetta hjálpt bóndunum væl. Tey fimm undanfarnu árini eru 129 gæs skotnar á henda hátt.

Heimildin at skjóta grágás er farin úr gildi, og Vinnunevndin metir tað vera umráðandi, at henda heimild verður latin av nýggjum, og at hon eisini umfatar brandgás.

Tað er umráðandi, at teljingarnar av grágás halda fram, og at brandgás eisini verður fevnd av hesum teljingum. Eisini er umráðandi at betra um teljingarnar, so tær verða gjørdar á hvørjum ári í samsvari við tilmælið frá Tjóðsavninum.

Nevndin metir tað vera neyðugt, at tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás og brandgás, skal kunna loyva fleiri persónum at skjóta á økinum, sum loyvið fevnir um, heldur enn bara einum persóni.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í nr. 1 verður § 17 a, stk. 4 orðað soleiðis:
"*Stk. 4*. Tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás og brandgás eftir stk. 1, kann loyva øðrum persónum at skjóta grágás og brandgás á tí øki, sum loyvið fevnir um, treytað av, at viðkomandi hava søkt um og fingið loyvi frá landsstýrisfólkinum."

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 15. mai 2026

Ben Arabo
formaður

Atli F. Johansen
næstformaður

Fía Selma Nielsen

Erhard Joensen

Árni Skaale

Eirikur í Jákupsstovu

Steffan Klein Poulsen